# 15 navnleysir málningar á Jinx

**- Eingin av málningunum hevur nakað heiti. Framsýningin kallast einfalt bara Hugbirtingar, tí so kunnu fólk sjálvi fantasera víðari út frá myndunum, sigur Livar Nysted, sum í hesum døgum hevur listaframsýning í Havn. Og undirtøkan var munandi betri enn væntað**

FRAMSÝNING
*Snorri Brend*



*Henda myndin av tveimum eldri fólkum varð seld eftir lítlari løtu. – Eg havi málað fleiri myndir við sama evni. Og eg haldi, at fólki dámar væl hesa myndina, sigur 35 ára gamli Livar Nysted úr Hvannasundi*
Mynd: Jens Kr. Vang

**Hvannasund:** - Eg var ikki meiri enn komin inn um dyrnar her í Hvannasundi, fyrrenn tann fyrsti málningurin var seldur.

- Tað má vera tí, at fólk dáma væl mínar málningar, sigur listamaðurin, Livar Nysted.

Sunnudagin lat hann upp eina framsýning við íalt 15 av verkum sínum í Gallarí Jinx í Havn. Hetta hendi seinnapartin, og eftir hetta legði hann leiðina norður aftur.

Men tað var beinanvegin at fyrsti málningurin varð seldur. Og síðani tá eru tveir aðrir seldir.

Framsýningin er opin tríggjar vikur aftrat, so enn er tíð hjá fólki at vitja framsýningina á Áarvegnum.

## Dáma málningarnar

Livar Nysted hevur havt fleiri framsýningar áður. Men henda framsýningin í Havnini varð øðrvísi enn hann hevði væntað - positivt!

- Ja, eg má bara siga, at undirtøkan higartil hevur verið munandi betri enn eg hevði doymt um.

- Tað má vera eitt tekin um, at fólki dámar málningar mínar, sigur hann.

Leiðarin av Gallarí Jinx tekur undir við hesum. Fólk hava eisini sagt honum, at tey eru væl nøgd við framsýningina.

Ein fyrimunur við at hava framsýning í Jinx er í fyrsta lagi, at hetta er eitt væl umtókt matstað.

Hinvegin so liggur tað út móti vegnum, og tað er ikki at taka seg aftur í, at nógv hava sæð málningarnar frá vegnum av, og eru síðani komin inn at hyggja eftir teimum.

## Spartlijarn

Dagliga arbeiðir Livar hjá Føroya Bjór í Klaksvík. Men ein stóran part av frítíð síni nýtir hann við spartlijarni í hondini.

- Mær dámar væl at mála um kvøldið ella út á náttina, sigur hann.

Sjálvur byrjaði hann at tekna sum ungur, og tá hann var um 20 ára gamal byrjaði hann eisini at mála.

Hetta er aðru ferð at Livar hevur framsýning í Havn. Hann hevur somuleiðis luttikið á framsýningum á Norðoyastevnu og hjá Lions Club í Runavík.

Livar er føddur í 1970 og er uppvaksin í Hvannasundi. Hann er giftur og eigur fýra børn.

# 1200 metrar asfalterast í næstu viku

**Arbeiðið við at dagføra vegastrekkið við Streymin gongur alsamt framá. Í næstu viku verður ein partur av strekkinum asfalteraður av nýggjum**

VEGARBEIÐI
*Snorri Brend*



*Teir hava gjørt fyrireikingarnar, og nú skal so asfaltið leggjast á*

**Streymnes:** Tann økta ferðslan eftir landi á Streymoynni krevur eisini gott vegakervi.

Í eina tíð hava fólk hjá Landsverki arbeitt við at dagføra umleið 2200 m av landsvegi norðanfyri Streymnes, eins og teir hava gjørt 10 metrar av breiðum vegi við akslum.

Eisini er ætlanin at dimensionera svingið, sum er norður móti brúnni um Streym til 80 km/t.

Í komandi viku verður so asfalt lagt á ein part av strekkinum, samstundis sum restin av teininum verður breiðkaður.

Frá Landsverki verður upplýst, at arbeiðið eftir ætlan verður liðugt í ár.

## Metluttøka til ungdómstiltak



*Fyrsta vikuskiftið í november verður leguhúsið fullsett av ungfólkum úr 9. til 10. flokk, sum fara á árligu novemberleguna*

**Nesvík:** Tey seinastu mongu árini hevur Leguhúsið í Nesvík verið karmur um fleiri ungdómstiltøk, m.a. tær sonevndu novemberlegurnar.

Aftur í ár standa hesar legur fyri framman. Men í ár hava fyrireikararnir fingið ein positivan trupulleika at taka støðu til.

Nú, gjørt er upp við tilmeldingini vísir tað seg, at ikki færri enn 431 ungfólk kring alt landið hava teknað seg til legurnar.

Upplýst verður, at á fyrru leguni 4. til 6. november, sum er ætlað fyri 9. til 10. flokk, er einki pláss eftir, men at nøkur fá pláss eru eftir til ta seinnu leguna, sum verður vikuskiftið eftir og sum er ætlað næmingum í 7. og 8. flokki.

- Hetta er størsta luttøkan sum vit vita um, siga fyrireikararnir.

**sb.**

## Ferðslunevnd fyri borgarin

**Gøta:** Á bygdaráðsfundi í Gøtu kommuni herfyri varð samtykt at seta á stovn eina ferðslunevnd.

Sambært uppskotinum til nevndina skal henda ferðslunevndin virka sum eitt millumlið og sambindingarlið millum borgararnar í kommununi og teir kommunalu myndugleikarnar.

Í reglugerðini stendur m.a., at ein og hvør hevur rætt til at senda inn uppskot, sum hava við ferðsluspurningar at gera. Nevndin hevur harafturat skyldu at viðgera øll innkomin mál.

Á fundinum varð samtykt at velja bygdaráðslimirnar, Maud Poulsen og Hans M. Foldbo sum kommunal umboð í nevndina. Triðja umboðið velur løgreglan í oynni.

**sb.**

## Stórur vøkstur í lønargjaldingum

**Hagtøl:** Seinastu tveir mánaðirnar, í august og september, hevur rættiligur vøkstur verið í lønargjaldingunum, vísa hagtøl frá Hagstovuni.

Tað eru í løtuni serliga fiskiskapurin sum stendur fyri hesum vøkstri.

Triðja ársfjórðing í ár vóru lønargjaldingarnar 1.510 mió. kr. Vøksturin, í mun til sama árfjórðing í fjør, er 53 mió., sum svarar til 3,6 %. Hetta er størsti vøkstur síðani 2. ársfjórðing 2004.

- Tað eru serliga lønargjaldingar í fiskiskapi sum nú bera vøksturin. Tær vóru 32 mió. ella 19,2 prosent størri, verður upplýst.

Tað skal tó havast í huga at í 3. ársfjórðingi í fjør vóru lønargjaldingarnar í fiskiskapi serliga lágar.

Aðrar vinnugreinar sum hava havt lutfalsliga stóran vøkstur eru ráevnisvinna, annar ídnaður, sjóflutningur og annar flutningur og vinnuligar tænastur.

Vinnugreinir har lønirnar eru í minking eru framvegis ali- og kryvjivirki, fiskavøruídnaður og nú eisini byggivinnan.

**sb.**



*Fiskivinnan hevur øktar lønargjaldingar*
(savnsmynd)